# FRÁ **BLÓÐKRABBA** TIL MARATON UPPÁ ÁTTA MÁNAÐIR

– HÓAST TAÐ **MANGAN** STÓÐ **ÓGVULIGA** NÓGV Á, VALDI EG **ONGANTÍÐ** AT GEVA UPP. SOLEIÐIS TEKUR UNGI ARGJAMAÐIN, **EYÐBJØRN KARBECH MOURITSEN**, TIL, IÐ LONGU SUM **21** ÁRA GAMAL FEKK STAÐFEST **BLÓÐKRABBA**. LES HER UM HVUSSU **EYÐBJØRN** VIÐ SÍNUM **ÓTRÚLIGA** STRÍÐSVILJA BASTI TÍ RÆÐULIGI **SJÚKUNI**, IÐ MUNDI TIKIÐ **LÍVIÐ** AV HONUM, OG HVUSSU HANN **FÁAR** MÁNAÐIR SEINNI VIÐ **MANÉR STAÐFESTI** SIGURIN VIÐ AT RENNA TEIR **42** KILOMETRARNAR Í EINUM **MARATONI**



**SAMRØÐA**
**Óli Jákup Jacobsen**
oj-j@hotmail.com

Eyðbjørn Karbech Mouritsen hevur altíð verið sum aðrir dreingir á sínum aldri. Hann er uppvaksin og gekk í skúla á Argjum, inntil hann flutti niður við familjuni í 4. flokki. Hann valdi sum flest onnur at taka eina studentarútbúgving, og kom hann tá aftur til Føroya at ganga í Hoydølum. Ikki grunaði Eyðbjørn, at hansara lív skuldi fáa eina bratta og álvarsliga vending fá ár seinni. »Eg hevði ongantíð fyrr verið sjúkur. Alt mítt lív hevði eg verið likamliga væl fyri, har ítróttur hevur fylt um ikki allan so ein ófatiliga stóran part av mínum lívi. Millum annað havi eg gjørt sera nógv við fótbólt, rógving og renning. Tað, at eg nakrantíð skuldi blíva álvarsliga sjúkur, var als ikki nakað, sum eg trúði kundi henda fyri meg. Men tað gjørdi tað,« sigur Eyðbjørn.



*Kemoviðgerðin, ið Eyðbjørn Karbech Mouritsen fekk aðru ferð var so sterk at um hann pissaði og okkurt av pissinum rakti húðina, so etsaði tað hol á húðina*

» Influensan vildi ikki fáa ein enda, men eg sá tó onga orsøk at óttast fyri tað, tí eg var ungur og væl fyri

### Ongantíð verið so kaldur

Tað var við endan av 3.g í Hoydølum í 2006, at Eyðbjørn byrjaði at merkja, at alt ikki var, sum tað átti at vera. »Mitt undir teimum endaligu royndunum í Hoydølum fekk eg eina influenza. Í fyrstuni hugsaði eg ikki stórvegis um hana og helt, at hon skjótt fór at ganga yvir. Eg tímdi ikki at avlýsa ella útseta royndirnar, men kreftirnar at lesa uppá og fyrireika meg vóru næstan ikki til staðar. Serliga minnist eg, tá eg skuldi upp í ítrótti. Ein floksfelagi og eg høvdu gjørt eitt rættiliga hart og krevjandi program, ið kravdi styrki og kondition, har eg m.a. skuldi svimja í Gundadali. Ongantíð í mínum lívi havi eg verið so kaldur, sum tá eg leyp í hylin. Kuldin var næstan til at taka í, og var tað mær heilt ógjørligt at fáa hitan aftur. Við hjálp frá nógvum koffein- og pínustillandi tablettum megnaði eg hóast alt at gjøgnumføra programmið,« sigur Eyðbjørn við einum skeivum smíli.

»Influenzan vildi ikki fáa ein enda, men eg sá tó onga orsøk at óttast fyri tað, tí eg var ungur og væl fyri. Omma mín, sum eg búði hjá, byrjaði tó eftir tveimum vikum at blíva eitt sindur nervøs og fór at skumpa undir at fáa meg til læknan. Hugurin hjá mær at fara til læknan var als ikki til staðar, men eg gjørdi tað tó, tá omman segði, at nú var nokk! Tey heldur óvæntaðu boðini frá læknanum vóru ikki at taka feil av: »Eyðbjørn, tú hevur eina sera alvorliga influenza!« og bað hann meg skjótast gjørligt um at fara oman til Landssjúkrahúsið og kanna meg nærri«, sigur Eyðbjørn.

»Dagin fyri mína síðstu roynd fór eg á sjúkrahúsið. Eg var har í fleiri tímar, bleiv fluttur aftur og fram uttan at vita, hvat ið gekk fyri seg. Tey tóku nakrar blóðroyndir og bóðu meg koma aftur dagin eftir. Eitt gloymi eg ongantíð, og tað er, tá ið læknin skjótt hugdi gjøgnum tølini frá blóðroyndunum og segði so hart og týðiliga: Ja, tú er sjúkur!«, sigur Eyðbjørn.

### Hvar bleiv hann sjálvur av har afturi?

»Tann endaliga royndin í støddfrøði var eisini ein sannur bardagi. Tá eg stóð við talvuna, sortnaði tað í heilum, og var tað mær næstan ógjørligt at konsentrera meg. Haraftrat sveittaði eg so illa um hendurnar, at kritið varð fulkomiliga vátt, og misti eg tað á gólv. Tá eg skuldi fáa karakter, segði lærarin, at hann var eitt sindur skuffaður av mær, men eg var rættiliga líkaglaður og ynskti bara at fáa húgvuna, so eg kundi sleppa avstað aftur,« sigur Eyðbjørn.

»Tað, ið eg minnist sum serliga hart, var, tá ið vit skuldu taka ta síðstu floksmyndina í Hoydølum, har vit øll stóðu í føroyskum klæðum og studentarhúgvu. Bara tað at standa